# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*»Um so er, man talan vera um heimssensatión, tí sambart hagtølum skuldu í hvussu so er 3 av hesum 3000 verið født við Downs Syndrom«*

*Jenis av Rana*

## Stórveldini uppí nú

Støðan í Miðeystri versnar fyri hvønn tíma. Ísrael verður álopið frá fleiri síðum, og hetta hevur gjørt, at landið av álvara er farið í hernað móti Hizbollah og Hamas. Sivil í bæði Gaza, Ísrael og Libanon eru offur í hesum stríði. Tað kann eingin liva við.

Bara stórveldini kunnu steðga hesum ørskapi. Hans Holm, ein av okkara frægastu eygleiðarum og viðmerkjarum, tá tað um uttanríkispolitisk viðurskifti ræður, sigur við Sosialin í dag, at um ikki stórveldini, sum eru á fundi í Skt. Petursborg í løtuni, taka seg um reiggj og leggja trýst á partarnar, so kann alt hetta enda í einum ragnarroki. Verður t.d. Tel Aviv rakt av Hizbollah rakettum framleiddar í Kina og seldar víðari til Iran, kann tað føra til, at ísraelar kenna seg so hart trongdar, at teir í síðsta enda kunnu brúka øll síni vápn. Hans Holm heldur tó ikki, at teir taka til atomvápn, men henda møguleika hevur landið so í ringasta føri.

Tíverri er stríðið í Miðeystri eisini ein partur av tí spæli, sum stórveldini spæla á altjóða politiska pallinum. Meðan USA og lutvíst EU hava lindi til at halda við Ísrael, so stuðla Rusland og Kina hin partin. Besta framtíðar loysnin heldur Hans Holm vera, at eitt neutralt land sum Norra aftur fær litið upp í hendi sín leiklut sum friðardiplomatur. Tað hevur landið víst fyrr, at tað dugur væl. Men fyri at forða fyri, at støðan versnar og breiðir seg til eitt nú Sýrialand, mugu stórveldini kenna ábyrgd og leggja trýst á partarnar.

**Sosialurin**

## Trygt sjúkrahús- fyri øll?

*Jenis av Rana*

Millum tíðindini Dimmalætting bar okkum týsdagin var tíðindastubbi um føðideildina á Sjúkrahúsinum í Kolding, sum fyri fýra árum síðani var: útskeldað í donskum fjølmiðlum, men nú: er hin tryggasta í øllum ríkinum. Meðan miðaltalið fyri deyða hjá børnum, ið vórðu ov tíðliga født í 2005 var 4,2% fyri alt landið, so var hetta bert 2,2 % í Kolding.

Víðari verður sagt, og eg endurgevi: ... í Kolding hava tey seinastu árini ment føðideildina við nútímans útgerð og viðgerðarhættir, ið kanna m.a. fyri mongolismu. Eingi børn født í 2005 í Kolding høvdu kromosombrek...

Meira sigur tíðindastubbin okkum ikki, ikki eitt orð um hvat hesir viðgerðarhættir verða nýttir til, ella hvussu tey við mongolismu hava tað har á sjúkrahúsinum. Men eg kann leggja afturat, at á hesum sjúkrahúsi verða árliga 3000 børn borin í heim.

3000 børn árliga, men eingin við kromosombreki! Tvs at hetta sjúkrahús, sum verður kosið at vera tryggasta í DK, ikki bjóðar einum einasta barni við kromosombreki vælkomið til lívið. Hvussu ber tað til? Verða eingi børn í økinum gitin við slíkum breki? Um so er, man talan vera um heimssensatión, tí sambart hagtølum skuldu í hvussu so er 3 av hesum 3000 verið født við Downs Syndrom, fyri at nevna eitt dømi.

Neyvan er tað so, at eingi børn eru, sum við ymiskum kromosombrekum síggja fram til at verða bjóðaði vælkomin í heim á hesum "trygga" sjúkrahúsi. Sannleikin man verða at finna í júst seinastu orðunum í tíðindastubbanum, at tey har hava hættir ( ikki bert viðgerðarhættir, sum sagt verður í tíðindastubbanum), sum sortera tey frá, sum samfelagið ikki ynskir skulu verða borin í heim. Um so er, er føðideildini í Kolding millum vandamiklastu støð í ríkinum hjá hvørjum barni, sum verður gitið í móðurlívi.

Og tað er ein onnur og ikki sørt rædandi søga, sum eigur at fáa okkum at drípa høvur í skomm og krimpa tærnar, við hugsanini um hvørji tey næstu fara at verða, sum verða frátikin rættin til( viðari) lív.




**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.